## HEILSANIR



**Góði Rógvi**
Tillukku við 20 ára degnum tann 10. juni.
**Gita hvør**



**Góða Harriet**
Tillukku við 11 ára føðingardegnum í dag.
**Ynska omman og abbin í Hvalba**



**Góða kona og mamma**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við degnum. Takk fyri alt tú ert fyri okkum.
**Ynskja maður og børn**



**Góði beiggi**
Hjartaliga tillukku á 11 ára degnum. Takk fyri at tú ert so góður við okkum
**Ynskja Oddvør og Mary**



**Hey Linda**
Happy Birthday, Darling, and All the Best in the Future. You'll Never Walk Alone.
**The Liverpool-fan vith Big L**



**Hehe Hey Símun**
Hjartaliga tillukku við æhhhh.... 27 ára degnum 12. juni. Alt tað besta.
**Heilsan eg**



**Góði Árni**
Hjartaliga tillukku á 11 ára degnum, Jesus pápi signi teg.
**Ynskja mamma og babba**



**Heyyyy hon sjálv**
Hjartaliga tillukku við 14 ára degnum og alt tað besta í framtíðini. Vit gleða okkum til Havnatúrin.
**Kærar heilsur ja, gita hvør**



Hetta fitta skrínið verður 15 ár í dag. Hjartaliga tillukku.
**Heilsan „ja gita nú hvør“**



**Góði abbi og abbabeiggi**
Hjartaliga tillukku við 75 ára døgunum.
**Ynskja Marita, Bjørg, Hans Jørgin, Tummas Eli, Kára, Hansa Torgerð, Sigmundur, Ingvar og Poula**

### Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á middegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:.........................................................................
.........................................................................
.........................................................................
.........................................................................
.........................................................................
.........................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .........................................................................
Bústaður: .........................................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«

**Sosialurin** hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00
fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo



## FILMSTEIGURIN

# Darkness Falls

Fyri meira enn 150 árum síðani hendi ein ræðulig hending í tí lítla fiskarabýnum Darkness Falls. Ein av íbúgvunum, tann barnaglaða, Matilda Dixon, var høgt vird millum borgararnar. Sjálvi høvdu hon og maður hennara ongi børn, men Matilda var ógvuliga góð við børnini í býnum, sum hon bakaði køkur og søtmeti til.

Tá maður hennara doyði í eini vanlukku, byrjaði Matilda at isolera seg meira og meira frá hinum í býnum, men hon helt áfram við at baka køkur til børnini í býnum, sum aftturfyri geva henni eina av teirra mjólkatonnum. Skjótt verður Matilda kend sum tanndísin.

Men eitt kvøldið í 1840 varð Matilda rakt av enn eini vanlukku. Meðan hon lá og svav kom eldur í komfýrin hjá henni. Nakrir av íbúgvunum vildu hjálpa við at sløkkja eldin, men tá teir komu til húsini var eldurin longu sløktur. Matilda vildi tó ikki sjálv koma út av húsinum, tí hon var forbrend.





Frá tá av isoleraði Matilda seg heilt frá umheiminum. Hon fór nú bara út um náttina, ílatin ein storan kappa og eina hvíta porselensmasku, sum dekkaði hennara brenda andlit. Men hon legði framvegis smáar gávur til børnini, sum løgdu teirra tenn uttanfyri hurðina.

Eitt kvøldið broytu íbúgvararnir meining um tað stakkals Matildu. Tvey av børnunum í býnum vóru nevniliga farin at vitja hana, men tá tey ikki vóru komin aftur um kvøldið fóru borgararnir til Matildu. Øll vóru vís í, at Matilda hevði gjørt børnunum mein og hon varð skjótt jakstrað út úr húsunum og hongd.

Nú, meira enn 150 ár seinni, líðir býurin framvegis undir óhugnaligu lagnuni hjá Matildu Dixon. Tað sigst, at andi hennara framvegis gongur runt í býnum um náttina, og hon drepur øll, sum hon møtir á vegnum.

Tann ungi Kyle, hevur sjálvur sæð andan hjá Matildu, men hann megnaði at sleppa vekk frá henni við lívinum. Hann er nú flýggjaður úr býnum, men tá genta hansara, Caitlin, setur seg í samband við hann, og fortelur, at lítlibeiggi hennara er farin at droyma um Matildu Dixon, ger Kyle av at fara aftur og hjálpa teimum. Skjótt standa tey andlit til andlits við andan hjá Matildu Dixon...





Frumsýning
Fríggjadagin 13.06. kl. $21^{30}$
Leygardagin 14.06. kl. $21^{30}$
Sunnudagin 15.06. kl. $21^{00}$

Fríggjadagin 13.06. kl. $23^{30}$
Leygardagin 14.06. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 15.06. kl. $23^{30}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




Fríggjadagin 13.06. kl. $23^{00}$ Leygardagin 14.06. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 15.06. kl. $22^{15}$




Fríggjadagin 13.06. kl. $19^{30}$ Leygardagin 14.06. kl. $19^{30}$
Sunnudagin 15.06. kl. $19^{00}$




Fríggjadagin 13.06. kl. $20^{00}$ Leygardagin 14.06. kl. $20^{00}$
Sunnudagin 15.06. kl. $19^{30}$

**KOMANDI FILMAR**




Frumsýning Fríggjadagin 20.06.




Frumsýning Fríggjadagin 20.06.